# Ein nýggjur nevndarlimur

**Á alfundinum leygardagin, fekk Havnar Arbeiðsmannafelag ein nýggjan nevndarlim**

AÐALFUNDUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Havnar Arbeiðsmannafelag hevði aðalfund leygardagin og har fekk felagið ein nýggjan nevndarlim.

Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali. Teir vóru Jan Midjord og Zacharias Thomassen.

Jan Midjord varð afturvaldur, men Jóan Carl Dam varð valdur í nevndina fyri Zacharias Thomassen.

Í eftirlønargrunninum hjá felagnum stóð áðurnevndi Jan Midjord, eisini fyri vali og hann varð afturvaldur.



*Aðalfundurin hjá Havnar Arbeiðsmannafelag leygardagin valdi ein nýgjan lim í nevndina*

# Harmast um at visjón-2015 er toppstýrt

VISJÓN 2015
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Tað verður spennandi at vita, hvar verkafólkið verður í 2015 og, hvør leiklutur teirra verður tá ið visjón-2015 verður sett í verk.

Tað sigur heldur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Á aðafundinum í Havnar Arbeiðsmannafelag um vikuskiftið, harmaðist hann um, at verkafólkið var so lítið sjónligt í visjón 2015.

– Ein hópur av fólki sett í ymsar bólkar at viðgera ymisk evni í sambandi við, at Føroyar skulu gerast heimsins besta land at liva í í 2015.

– Men í hesum sambandi er alt toppstýrt. Botnurin var als ikki tikin við. Fakfelagsfólk, ið umboða vanliga løntakaran, vóru ikki við í teimum nevndum, ið settar vóru.

Hans Joensen sigur, at tí settir hann eitt stórt spurnartekin við, hvussu framtíðar Føroyar skulu styingast út í kortið, tá ið fakfeløgini ikki vóru við.

– Men av illum bar til at vera við í visjónstorginum, leggur hann afturat.

# Fleiri túsund arbeiðsfólk fáa nógv bíligari trygging

**Samstarv ímillum Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag fer at geva arbeiðsfólki nógv bíligari lívstrygg-ingar**

SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú fáa fleiri túsund arbeiðsfólk nógv bíligari lívstryggingar

Tað er eitt úrslit av nýggjum samstarvi ímillum Havnar Arbeiðsmananfelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Endamálið við tí samstarvinum er at legga lívstryggingarnar hjá báðum feløgunum saman.

Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag hava hvør sína lívstrygging, sum fellur til gjaldingar, tá ið arbeiðsfólk doyggja, ella verða álvarsliga sjúk o.s.fr.. Men seinastu tíðina hava feløgini tosað um at leggja tryggingarnar hjá báðum feløgunum saman.

## Betri og bíligari

Fyrimunirnir við tí, eru, at tryggingarnar verða munandi bíligari og sostatt eisini betri.

Tað er nakað síðani at Føroya Arbeiðarafelag samtykti at taka undir við ætlanina og nú hevur so Havnar Arbeiðsmannafelag gjørt tað sama.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, sigur, at á aðalfundinum í felagnum leygardagin, tóku limirnir væl ímóti ætlanini at leggja báðar tryggingarnar saman.

- Nevndin í felagnum skal umsita ognirnar á besta og tryggasta hátt. Og tað skerst ikki burtur, at ein týðandi partur av virkseminum hjá felagnum eigur at vera at tryggja limirnar best møguligt og tí hava vit kannað teir møguleikar, sum eru, sigur hann.

Tað er nú endað við, at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmananfelag, hava tikið av einum tilboði frá danska tryggingarfelagnum, ALKA um at leggja báðar tryggingarnar saman.

– Ofta vísir tað seg, at jú fleiri limirnir eru, sum skulu tryggjast, jú bíligari verður gjaldið fyri hvønn lim, sigur Hans Joensen.

Hann sigur, at eftir tilboðnum frá ALKA fær hvørt arbeiðsfólk eina munandi bíligari trygging við at leggja tryggingarnar hjá báðum feløgunum saman, heldur enn um hvørt felag var fyri seg sjálvt.

– Tað er ongin ivi um, at tað er rætt at Havnar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag hava tryggingarnar saman, sigur hann.

## Skulu samstarva meiri

Hans Joensen sigur eisini , at seinastu tíðina hevur nógv verið tosað um samstarv millum tey føroysku fakfeløgini, og at tey skulu kunna tosa við einari rødd sum ein mótvekt til Vinnuhúsið.

– Men skal hetta bera til, mugu arbeiðarafeløgini fyrst av øllum finna saman í góðum samstarvi. Tað hava vit roynt seinastu tíðina og feløgini hava eisini tosað saman um samstarv, og hvussu hetta skal skipast.

– Og nú er avtalað, at formenninir í arbeiðarafeløgunum skulu seta seg saman og fáa greiði á, hvussu vit møguliga skulu skipa okkum í samstarvi í framtíðini, sigur Hans Joensen

Hann sigur góður vilji er í arbeiðarafeløgunum at samstarva har tað er til fyrimuns fyri limirnar og tað er tað sum heild.

– Við at samstarva við Føroya Arbeiðarafelag, fáa vit øll eina munandi bíligari trygging, sigur Hans Joensen, vm, sum her situr saman við skrivara felagsins, Monradi Kjelnes,

# Tvørafólk fáa gøtunøvn og húsanummur

Nú fáa eisini tvørafólk gøtunøvn og húsanummur.

Hetta er eitt mál, sum kommunan hevur arbeitt við í langa tíð, men nú er arbeiðið liðugt.

Á seinasta býráðsfundi á Tvøroyri, varð sostatt samtykt, hvussu einir 50-60 vegir og gøtur í kommununi skulu eita.

Kommunan fer nú at syrgja fyri, at skelti verða sett upp. Kommunan ætlar sær at útvega skelti og húsanummur, so at alt verður líka í kommununi fyri at tað skal vera snøggari.

Men samstundis stúrir býráðið fyri, at tey gomlu staðarnøvnini fara at hvørva heilt og tí hevur tað eisini samtykt at seta skelti upp við teimum ymsu staðarnøvnunum á.